# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur 4. s.e.trettanda:**
***Havnar kirkja:*** Kl. 11, Sonja Klein
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Bergur D. Joensen, altargongd
***Argir:*** kl. 11, Heri Joensen Talvan gongur í *Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi* fyri Kirkjuligu Heimamissiónina
***Kollafjørður:*** kl. 12, sjónvarpsgudstænasta. Luttakandi: Magni Christiansen. Mogens Tilsted Christensen
***Miðvágur:*** kl. 11, altargongd, David Johannesen
***Gásadalur:*** kl. 11 – Inga Poulsen Dam
***Skála:*** kl. 11, altargangur, (Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna) Jógvan Fríðriksson.
***Selatrað:*** kl. 17, Kingosangur úr Tjørnuvík, Jógvan Fríðriksson.
***Norðskála:*** kl. 12, hátíðarmessa Hans J. Joensen, biskupur, og Emil Olsen (kirkjan fyllir 75 ár),
***kl. 17*** Bjarni Bæk, dómpróstur.
***Fuglafjørður:*** kl. 12, Uni Næs
***Viðareiði:*** kl. 12, Elsa Funding
***Skopun:*** kl. 12, Sverri Steinhólm
***Tvøroyri:*** kl. 11, familju- og barnagudstænasta, Jónsvein Bech
***Vágur:*** kl. 11, Patrick de Neergaard
***Porkeri:*** kl. 12, Patrick de Neergaard
***Hvalba:*** kl 12.30, Jette Paarup

**Hebron, Argir**
Mikudagin 24. januar kl. 20.00: Bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar.
Sunnudagin 28. januar:
Kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30: Samvera við drekka.
Kl. 12.00: Familjumøti.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!
www.hebron.fo

**Ebenezer**
Mikudag
kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti - Talari: Jógvan Páll Sevdal - Evni: Matt 28
Hósdag
Kl 17.00 Sangvenjing, Barnakórið og Kassia
kl. 20.00 Ungdómsmøti - Talari: Mats Brisenfeldt
Fríggjadag
kl. 20.00 Teen-Night – Er í Ebenezer
Sunnudag
kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Lívdin**
*á Brekku 3*
Fríggjakvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti.
***Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla***
kl. 10.30 Familjumøti har Símun Absalonsen talar um "Ávøkstur Andans: Gleði".
Kl. 11.30 samfelagsløta
Kl. 12 Tilbiðjunar/ lovsongsmøti Anna Háberg skipar fyri.
Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur.
Kl. 12 Sunnudagsskúli
Møtini kunna hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagur 25. jan. Eingin bíbliutími vegna missiónsviku í Havn.
Sunnudagur 28. jan kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti vegna missiónsviku í Havn
Mánadagin 29. jan. kl. 20 Sjómanskvinnuringurin møtist.
Sí annars www.koma.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandidag kl. 17.30 Orðsins tænasta í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsins tænasta í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Øll eru vælkomin.
Týsdagin tann 30. januar - fyri tey sum lesa »True Life in God« Satt lív í Gudi. Bønarløta verður síðsta týskvøldið í hvørjum mánaði kl. 19.30 í Mariukirkjuni.
www.katolsk.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Hóskvøldið kl 20 ungdómsmøti v/Eyðun Miðberg.
Fríggjakvøldið kl. 20 møti v/Eivind Frøen, sangur frá Oasubrøðum.
Leygarkvøldið kl. 20 møti v/ Eivind Frøen, sangur frá Vága Streingjakóri.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Eivind Frøen, sangur frá Soli Deo Gloria.
Mánadagin kl. 17.15- 18 venur barnakórið kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Frá Frelsunarherinum í Tórshavn**
Mikudagin 24. januar kl. 15 Bøn.
Hósdagin kl. 20 Heimaforbund.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti, Suðringar luttaka.
Sunnudagin kl. 11 Møti, Suðringar luttaka. Kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17 Møti, Suðringar luttaka.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00: Møti.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli á Norðrasta Horni.
Einki møti sunnukvøldið.

**Samkoman við Marknagil**
***Skúlaheimið, Marknagilsv.75***
Møti: Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Kl.12 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 7 morgunbøn, kl. 17 bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19 Delli
Hósdagin kl. 7 morgunbøn
Fríggjadagin kl. 7 morgunbøn kl. 22 Landsbøn
Leygardagin kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 10.45 Morgunmøti, Fríðtór Debes talar, kl. 11.30 Barnagudstænasta.
Mánadagin kl. 7 morgunbøn, kl. 20 bønarskúlin.

**Samkoman Immanuel Brekkutún 3, Hoyvík**
Mikukvøld kl. 20 Bíbliutími.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing kórið venur.
Hósdagin onki í KFUK, víst verður til missiónsvikuna í Havn.
Mánadagin 29. januar kl. 15 Eldrasamkoman í KFUK við Guttorm Zachariasen.

**Aglowfundur**
verður í Miðlahúsinum í Vágsbotn leygarkvøldið 27. januar kl. 19.30.
Vit gleða okkum at síggja teg.
Heimasíðan hjá Aglow: www.aglow.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16 eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti við karaoke.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl 18 evangeliskt møti við Lindu Petersen.
www.gospel.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**KEDRON í Sørvági**
Mikukvøldið 24. januar:
Bønarmøti kl: 20.00 í KEDRON.
Sunnudagin: 28. januar:
Breyðbróting og Læra kl: 11:00
KL: 12.30 Familjumøti. Ein drekkamuður verður eisini aftaná.
Onki møti um kvøldið kl: 18.00
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Børnini Møtast:
Børnini møtast kl: 11.00 í Húsmøðra-felagshúsinum í Sørvági, har øll bera eru hjartaliga vælkomin.
Samkomulegan:
Samkomulegan verður hin 16. – 18. februar á Zarepta. Tilmelding fer fram við at tekna seg á ein av tilmeldingarlistunum, ið liggja frammi, ella ringja til Mirjam Kjølbro á Tlf. 27 14 01 ella 33 33 02,
e-mail: mkjolbro@msn.com

**Sandavágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 25. januar kl. 20 í Meinigheitshúsinum. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Filadelfia Vágar Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn. Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti. Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Saron, Vestmanna**
Hósdagin 24/1 barnaarbeiði í Saron klokkan 19.
Sunnudagin 28/01 evangeliskt møti klokkan 18, Tummas Jacobsen úr Filadelfia í Havn talar, náttturði aftaná møti.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bønarmøti verður hvørt kvøld hesa vikuna kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sjómannskvinnuringurin**
í Kollafirði kemur saman í Missiónshúsinum mikukvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Saron Haldórsvík**
Mánadagin 29/1 húsmøti hjá Kirstin og Eirik Samuelsen, klokkan 20.

**Aglow Eysturoy**
Leygardagin 3. febr. kl.15 verður Aglow møti í kirkjukjallaranum í Gøtu Kirkju, Jensina Simonsen hevur orðið.
Morid simonsen og Jórun Hansen Leiða lovsang.

**Bønhúsið á Hellunum**
Møti sunnukvøldið kl. 19, v. John S. Myllhamar. Innsavning.

**Missiónshúsið í Oyndarfirði**
Møti sunnudagin kl. 17, v. John S. Myllhamar, trúboðara.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30.
Páll á Lakjuni talar. Evni: Ein stórur frelsari – ein stór frelsa (úr Hebrearabrævium). Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake ymisk ung luttaka.
Sunnudagin kl. 17, sang og vitnimøti. Barnamøti kl.17
Aftaná møtið verður samkomufundur um páskastevnuna.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Skrá fyri vikuna:
Mikukvøldið kl. 18 Tim5
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Jonnu & Palla Højgaard, Saltangará
Hósdagin kl. 16 Liljur
Sunnudagin kl. 10.30: Møti
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
***Mikudagin 24. jan.kl. 20:*** Meinhard Bjartalíð talar. Kórið í Gøtu.
***Hósdagin 25. jan. kl. 20:*** Knút Larsen talar. Glyvra Streingjakór.
***Fríggjadagin 26. jan. kl. 20:*** Regin Høgnesen talar. Leirvíkar húsakór
***Leygardagin 27. jan. kl. 10:*** Bíbiltími v/Hjalmar Hansen. Evni: »Rættvísgjørt av trúgv.
Kl. 16:Barnamøti við Barnakórinum á Strondum.
Kl. 20: Jóhannus Mikkelsen talar. Systrarnar Simonsen av Glyvrum syngja.
***Sunnudagin 28. januar:***
Kl. 11:00 Guðstænasta við altargongd v/ Meinhard Bjartalíð.
Kl. 15:00 Familjumøti í kirkjuni v/ Johild Finson. Barnakór Glyvra kirkja.
Kl. 19:00 Niels jacob Nielsen talar.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin kl. 20 Bíbiltími.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Dagtilhaldinum à Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.
***Hósdagin 25.1.07. er avlýst vegna jarðarferð.***

**Petur Magnussen 90 ár**
Sunnudagin 28. januar verður Petur Magnussen í Sandavági níti. Tey, sum hava huga at heilsa upp á Petur á føðingardegnum, eru hjartaliga vælkomin í SÍF - húsið millum kl. 16.00 - 20.00 sunnudagin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 3. feb. kl. 15.00 giftast í Hvalvíkar kirkju Gerda Árny Mortensen, Skælingur og Rúni Mortensen, Streymnes. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey í ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf: 422331 ella 421289 áðrenn 24. januar.

Leygardagin, 27. januar kl. 12 giftast í Havnar Kirkju Noomi Weihe, Lamba og Jákup Martin Joensen, Eiði.
Vælkomst verður í Havnar Róðrarfelag frá kl. 14.



Tað hevði glett okkum, Emmu Mariu Gerðisá, Nes og Ove Hentze, Eiði nú vit ætla at ganga í hjúnaband at sæð vinir og kenningar at hátíðarhalda dagin saman við okkum. Vígslan verður sunnumorgun 18. mars kl. 9.30 í Fríðrikskirkjuni. Borðhaldið verður kl. 14 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey ið vilja gleða okkum, verða biðin at siga frá á tel. 423065, 585237 ella 448158. Tilmeldingarfreistin er 4. mars.

Í samband við brúdleyp okkara tann 23. juni 2007 hevði tað glett okkum at sæð vinir og familju til vígsluna í Mammen kirkju



kl. 14 og veitsluna, sum verður seinni um kvøldið í »Mammen forsamlingshus«. Tey, sum hava hug at gleða okkum á degnum, kunnu siga frá á tlf. 218042 (Maibritt) áðrenn 30. januar 2007. Fyri tey, sum ynskja tað, er eisini møguleiki fyri gisting. Vit hava høli til taks frá 21.-25. juni og vit kunnu eisini syrgja fyri koyring frá Billund til Mammen og aftur til Billund.
**Vinarliga Ann Mari Dam (Streymnes) og Lars Haahr Jensen**

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 20. februar 2007 hava Fríðhild og Bjørgvin Winther í Skopun silvurbrúdleyp.



Veitslan verður hildin leygardagin 24. februar í Samljóð. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg áðrenn 15. februar á telefon: 361665, 214001 og 214665.

**120 ára føðingardagur**
Leygardagin 3. februar 2007 kl. 19 fara vit - Bigga Toftum og Palle Olsen - at hátíðarhalda, at



vit bæði runda tey seksti. Tað hevði glett okkum at sæð familju, kenningar og gamlar sum nýggjar vinir í Sjónleikahúsinum. Vinarliga sigið okkum frá áðrenn 26. januar 2007 á telefon 319114 ella 285878 ella 211914 aftaná kl. 18 ella á teldupost palol@post.olivant.fo